LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 57

Fra: Hallgerð Akurstein <hallnsim@hotmail.com>
Sendt: 23. februar 2024 12:04
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringsskriv til "Lóg um burðardygga ferðavinnu"

Góðan dag!

Í gjár var eg í Skálanum og nevndi møguleikan at brúka telefonirnar í samband við trygd, tá gingið verður í haga.
Eg vísti á dømi úr Íslandi. Nú havi eg kannað tað aftur. Tað var soleiðis, at øll útlendsk telefon nummur, sum komu í ávís øki fingu øll sms: t.d nógvur roykur er frá eldgosinum liggur við Grindavík, Suðurlandsbreyt er stongd í løtuni, osfr.
Á tann hátt kemur kunningin til øll, og hon krevur ikki handling frá nøkrum. Man skal ikki downloada eina app ella nakað. Ltso gáttin er lág!
Man kundi ímynda sær, at um teir eru á fjalli á Slættaratindi, so kunnu øll útlendsk nummur, sum koma koyrandi móti Eiði og Funningi fáa sms.

Haldi afturat hesum, at turistskatturin er ein byrjan at leggja ein part av ábyrgdini hjá ferðafólkunum, men MVG á gisting kundi eisini breiðka inntøkugrundarlagið hjá Landskassanum, so ferðafólk eisini rinda inn í kassan.

Vh
Hallgerð kurstein